FØROYA HANDILSSKÚLI

# Teldustøðingar

**Nýggjur flokkur av teldupstøðingum byrjar í september 2011.**



**Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhalds-útbúgving, ið tekur 2½ ár.**

Endamálið við útbúgvingini er at førleikamenna teg til sjálvstøðugt og í verkætlanum at loysa tær mongu uppgávurnar, sum knýta seg til kunningartøkni. Á útbúgvingini er møguleiki at gera fleiri spennandi verkætlanir.

Tú gerst kvalificerað/ur til sjálvstøðugt at kunna arbeiða við at greina, gera ætlanir og verkseta loysnir, sum snúgva seg um nýmenning, framhaldandi menning og samskipan av KT-skipanum hjá privatum virkjum og almennum stovnum.

Eftir lokna útbúgving eru góðir møguleikar fyri beinleiðis starvi innan KT ella fyri framhaldandi lestur í KT á bachelor støði.

**Umsóknarfreistin er 1. juni.**

**Kunning um útbúgvingina og umsóknarblað fæst á www.fh.fo ella við at venda sær til Føroya Handilsskúla**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

Teldustøðingaútbúgvingin er skipað sum fulltíðarlestur í 2 ½ ár. Útbúgvingin er sett saman av 4 høvuðsøkjum: forritan, systemmenning, tøkni og virkið. Hartil koma eisini sergreinar, pratikk og høvðusuppgávan. Útbúgvingin telur 150 ECTS og verður megin-partin av útbúgvingini góðskriva um lesandi søkja inn á bachelor í KT.

Innlendismálaráðið

# Stjóri til Umhvørvisstovuna

**Søkt verður eftir stjóra til Umhvørvisstovuna at byrja sum skjótast.**

**Starvið**
Stjórin hevur evstu ábyrgdina av stovninum. Saman við leiðsluni á stovninum leggur hann virksemið til rættis og setir yvirskipaði mál fyri øll arbeiðsøki. Harumframt hevur hann ábyrgdina av fíggjarstýring, og at játtanir verða hildnar.

**Fakklig førleikakrøv**
Stjórin skal hava viðkomandi kandidatútbúgving frá lærdum háskúla og royndir innan leiðslu og fíggjarstýring. Harumframt er tað ein fyrimunur, um hann hevur leiðsluútbúgving.

**Persónlig førleikakrøv**
Stjórin skal hava góðar samskiftiseginleikar, eins og hann skal duga væl at orða seg. Hann skal duga væl at fyriskipa og leiða starvsfólk og skal kunna vísa á leiðsluroyndir. Tá ið tørvur er á tí, skal stjórin evna at skera ígjøgnum.

Stjórin skal viðvirka og stuðla tryggari málsviðgerð og mannagongdir og hava gott innlit í almenna fyrisiting og politiskar tilgongdir. Hann skal hava gott innlit í tær uppgávur, sum stovnurin skal loysa, eins og hann skal hava lætt við at seta seg inn í nýggj viðurskifti. Harumframt skal hann kunna fara niður í smálutir uttan at missa yvirlitið. Tað er av stórum týdningi, at stjórin sær yvirskipað upp á tær mongu ymisku uppgávurnar, sum stovnurin skal loysa.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til Innlendismálaráðið, Postrúm 159, Tinganes, 110 Tórshavn, ella við einum teldupostí til imr@imr.fo og skal verða ráðnum í hendi í seinasta lagi tann 6. juni 2011.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra í Innlendismálaráðnum, á tlf. 558070, ella við at senda ein teldupost til runij@imr.fo.

*Umhvørvisstovan varð sett á stovn í 2007, tá ið Matrikulstovan, Tinglýsingin, Landsfólkayvirlitið, Skógrøkt Landsins og Umhvørvisdeildin vórðu løgd í ein stovn. Umhvørvisstovan fyrisitur matrikulering, umhvørvisvernd, tinglýsing, landsfólkayvirlit og adressuskrá. Eisini fyrisitur stovnurin almenn náttúruøki og samskipar kort og skrásetingar, veitir tænastur og fremur gransking og kunning innan ásett virkisøkir. Stovnurin arbeiðir somuleiðis við yvirskipaðum lendisætlanum fyri landið, sum umhvørvislóggáva og byggi- og planlóggáva fevna um. Innan viðarvøkstur og frílendi stendur stovnurin fyri umsiting av almennum náttúrulendi. Á stovninum eru 41 fulltíðarársverk.*

# TAKS sóknast eftir einum roknskaparleiðara

## Vilt tú vera við til at tryggja, at landskassaroknskapurin er rættur?

**Høvuðsuppgávan** hjá roknskaparleiðaranum er at tryggja, at roknskapurin er rættur fyri stovnsnummur, ið TAKS umsitur.

**Uppgávurnar hjá** roknskaparleiðaranum eru eisini:
- At betra og effektivisera arbeiðsgongdir á stovninum
- At leiða og luttaka í ymsum verkætlanum
- At gera fíggjarlig hagtøl og metingar
- At hava eftirlit við fíggjarætlan
- At hava ábyrgdina av innaneftirlitinum hjá TAKS.

**Roknskaparleiðarin** hevur tvær smærri bókhaldsdeildir undir sær og vísir beinleiðis til stjóran.
Umsøkjarar til starvið skulu hava eina viðkomandi roknskaparliga útbúgving á merkonomstøði ella hægri.

**Royndir** innan almenna fyrisiting og alment roknskaparhald eru ein fyrimunur. Somuleiðis eru royndir í umsiting av skatta- og avgjalds-inntøkum ein fyrimunur, eins og kunnleiki í búskaparskipan landsins.

**Starvið krevur** eisini ávísan kunnleika til føroysk samfelags- og fíggjarviðurskifti.

**Tann, ið søkir, skal:**
- Vera framfýsin
- Megna eftirlitsarbeiði
- Hava góð evnir at samstarva
- Hava góða heildarfatan, men eisini góðan sans fyri smálutum
- Duga væl at skipa arbeiði og taka avgerðir
- Vera sera ábyrgdarfull/ur

**Starvið verður lønt** ájavnt við 35. lønarflokk í sáttmálanum ml. Tænastumannafelagið og FMR, umframt 15% í eftirløn, uttan tó at vera eitt tænastumannastarv.
**Setanarøkið** er TAKS, men fevnir eisini um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Meira fæst at vita** um starvið við at venda sær til Eyðun Mørkøre, stjóra, á telefon 352600.

**Send umsóknina**, merkt Roknskaparleiðari, innan 1. juni 2011 kl. 12.00, til:

**TAKS, Postsmoga 2151,**
**FO-110 Tórshavn**
ella taks@taks.fo



TAKS er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. TAKS hevur 135 starvsfólk og er skipað við einum høvuðssæti á Argjum og trimum skrivstovueindum.

www.taks.fo